# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 23. februar 2010


Ole Einar Bjørndalen er eitt av sterkastu kortunum hjá Noreg til vetrarítrótt, men í Vancouver hevur gingið av skriðjuni til hjá honum

# Norðmenn harmast um Bjørndalen

**Ole Einar Bjørndalen hevur ikki borið Noregi OL-gull enn**


herls@sosialurin.fo
Heri Simonsen

Hóast Noreg hevur vunnið 5 gull-heiðursmerki, og 12 OL-heiðursmerki á hesum leikunum, so eru norðmenn alt annað enn nøgdir. Norðmenn eru serliga vónbrotnir um Ole Einar Bjørndalen, sum bert hevur vunnið eitt silvurmerki higartil.

Kappingarár aftaná kappingarár hevur Ole Einar Bjørndalen vunnið eitt hav av kappingum, og tí er eitt silvurmerki aftaná fýra einstaklinga-kappingar als ikki nøktandi fyri ta kræsnu norsku tjóðina.

Skíðskjótingarserfrøðingurin hjá NRK, Stian Eckhoff verjir Bjørndalen:

– Ole hevur fingið eina ringa byrjan, og er tí blivin strongdur av at royna at fáa gongd á. Hetta er blivið ov hart fyri Ole, staðfestir Stian Eckhoff.

Tað var ein skelkur fyri mong heima í Noregi, tá »skíðskjótingar-kongurin« byrjaði OL í Vancouver við at raka við síðunnar av fýra ferðir, og bert endaði á einum 21. plássi í sprintkappingini.

Í kappingini ígjár rakti Ole Einar Bjørndalen sjey ferðir við síðunnar av, og endaði fjórðaftast, og tað er skelkandi, tá ein hugsar um, at Bjørndalen hevur vunnið 42 altjóða meistaraheiti.

Ole Einar Bjørndalen hevur onga góða frágreiðing um hví tað gongur av skriðuni.

– Eg havi gjørt alt tað, sum eg skuldi gera áðrenn OL, allar ætlanir eru fylgdar nágreiniliga. Eg má seta meg niður og hugsa um tað sum er hent her á vetrarleikunum. Hetta er ógvuliga súrt, og eitt stórt vónbrot fyri meg, sigur Ole Einar Bjørndalen við norska kringvarpið.

## Kvinnudystur á Hálsi

**Kvinnuliðini hjá Neistanum og VÍF spæla í kvøld útsettan dyst í Sunset-deildini**

Talan er um dystin, sum av røttum skuldi verið spældur sunnudagin, men sum vegna donsku landsliðsvitjanina varð fluttur.

Undan dystinum er Neistin púrasta einsamalt á triðja plássinum í kappingini, og her verða tær helst eisini verðandi.

VÍF er tó einasta av niðaru liðunum, sum hevur bast Neistanum, og kunnu tær gera tað sama einaferð afturat, er púrasta vist, at tær bjarga sær sessinum deildini.

**mørk**

## Niðurflytingin bíðar

**Starsvnevndin hjá Hondbóltssambandinum hevur á fundi gjørt av, at spurningurin um niðurflyting úr bestu deildunum ikki verður viðgjørdur, fyrr enn kappingin er av**

Tað skrivar HSF á heimasíðu sínari.

Síðani tað tíðliga hetta kappingarárið stóð greitt, at Team Klaksvík er ávegis móti Atlantic Airways-deildini, hevur verið kjakast, um tað er rætt ella ikki at lið flyta niður. Hetta tí talið av hondbóltsfeløgum er somikið avmarkað, at tað verur sera tungt hjá liðnum, sum flytur eina deild niður, at koma fyri seg aftur.

Spurningurin varð viðgjørdur á starvsnevndarfundi í gjár, og her var semja um, at málið ikki verður viðgjørt fyrr enn eftir landskappingina.

**mørk**

## Don Ø gevst

**Flemming Østergaard, betri kendur sum Don Ø, er liðugur sum formaður fyri Parken í Keypmannahavn. Hann stillar ikki uppaftur til nevndarformann**


rogvi@sosialurin.fo
Rógvi Nybo

Hann boðaði í gjár nevndini í Parken Sport & Entertainment A/S, at hann, eftir 13 ár á odda, ikki stillar uppaftur til nevndarformann, tá aðalfundur verður í apríl.

Í fráboðanini greiðir hann frá, at trýstið á hansara egna persón er blivið ov stórt.

– Tað hevur verið spennandi at standa á odda fyri Parken-samtakinum og F.C. København, men tað ógvusliga fokusið á mín persón teir seinastu mánaðirnar hevur verið sera krevjandi og eftir mínari meting einsrættað, sigur Flemming Østergaard í fráboðanini til nevndina í dag.

Ein av áfinningunum hevur verið tann ógvusliga lønin, sum Flemming Østergaard hevur fingið gjøgnum árini.

Lønmodtagernes Dyrtidsfond, LD, eigur 30 prosent av Parken og skal spýta 150 milliónir krónur í eina bjargingarætlan upp á tilsamans hálva milliard. Tað var eisini stjórin í LD, Carsten Koch, sum í november steðgaði persónligum milliónaútgjaldingunum til Flemming Østergaard, sum síðani 2002 hevur tryggjað formanninum 23,2 milliónir krónur í inntøkum.


**Flemming Østergaard hevur seinastu 13 árini verið nevndarformaður í FCK. Hetta tíðarskeiðið hevur felagið ment seg til tað sterkasta í Danmark, men tað er ikki altíð, at nevndarformaðurin hevur verið so væl umtóktur**